# Jákup Zahle farin



*Tá Jákup og Eydna giftust í 1997. Hon doyði stutt eftir brúdleypið*

Sunnukvøldið 3. februar andaðist Jákup Olsen, Jákup Zahle, sum hann var nevndur, hann var føddur í 1943 og hevði fylt 59 ár 5. februar.

Foreldur Jákups vóru Birtelena, f. Djurhuus ættað úr Hósvík og Jacob Olsen, postboð úr Havn.

Jákup var lærdur sum bilmekanikari frá verkstaðnum hjá Vilhelm Nielsen, men hann var ikki bara bilhandverkarin, tí flestu minnast hann frá Sjónleikarahúsinum, sum sjónleikarin og ótroyttiligi hjálparmaðurin hjá Havnar Sjónleikarfelag. Var hann ikki við á palli, var hann sum oftast ein av neyðugu hjólunum aftan fyri leikin. Sjónleikaralistin var hansara stóri áhugi.

Uttan fyri Sjónleikahúsið var hann eisini sum listamaðurin, hann hevði týðandi leiklut í leikinum »Glataðu spælimenninir«, sum var settur upp í Norðurlandahúsinum t. d., men einamest minnast vit hann í barnaleikum, tá hann spældi fyri børnum.

Eftir Jákup verður tómleiki, øðrvísi fær tað ikki verið, bæði sum sjónleikari og sum menniskja at vera saman við, var hann livandi og leikandi.

Í september 1997 giftust Eydna og Jákup, men longu 17. desember andaðist Eydna eftir svára sjúku, og nú vóru boðini eisini eftir honum.

Jákup fróddist, at hansara kæru vóru um hann hesa tíðina, hann so ofta skiftist ímillum at vera heima og á sjúkhúsi.

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu
og alt hjálpsemi, tá kæra kona, mamma,
vermamma og omma okkara

***Jonna Andreasen***
f. 7. september 1940
d. 6. januar 2002

andaðist og fór til gravar.

Tøkk til prestar, kirkjutænarar, sangarar,
berarar og gravarar, og til tykkum øll, ið hava
ringt og somuleiðis stukku inn á gólvið.

Tøkk til tykkum, ið hjálptu til við ervinum,
og á ymsan hátt stuðlaðu í stóru sorg okkara.

Tøkk fyri blómur og kransar, og
takk til tykkum øll, ið fylgdu henni
til hennara seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna
***Eyðun, Diana, Karl og Hans Jákup***

## Tøkk

Øllum tykkum – av Viðoynni til Suðuroyar og tykkum uttanlands – ið mintust meg á pálsmessu, nú eg rundaði tey sekstifimm, takki eg hjartaliga.

Heilsan
**Michael Matras**

†

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at okkara kæra
mamma, vermamma, omma og langomma

**Edith Mortensen**
fyrrv. lærarinna í Oyndarfirði

andaðist á eldrasambýlinum Vesturstovu
í Fuglafirði hósmorgunin 7. februar 2002,
88 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Oyndarfjarðar kirkju
sunnudagin 10. februar 2002 kl. 13[00].
Sungið verður úr sálmabókini.

Tey, ið vilja minnast Edith, kunnu lata
eldrasambýlinum Vesturstovu
eina peningagávu.

*Fyri tey avvarðandi*
**Marjun og Jaspur**


Laaaannngt vikuskifti í Aberdeen

hósdag til mánadag...ja!




Aberdeen hevur nógv at bjóða tær, bæði til gaman og álvara. Spáka tær ein túr eftir longu handilsgøtuni Union Street. Vitja tey ymisku søvnini og tað væl umtókta SATROSPHERE, sum er áhugavert fyri bæði børn og vaksin. Hugna tær við einum góðum bita á einari av teimum mongu frálíku matstovunum. Og gloym ikki at vitja pubbirnar við tí livandi tónleikinum.

Ja, Aberdeen hevur sanniliga nógv at bjóða.

**Íroknað er** flogferð, fýra nætur á dupultkamari við morgunmati og ferðaavgjøld.
Tilboðið er galdandi til 1. apríl.

Fráferð úr Vágum hósdag kl. 17.30.
Fráferð úr Aberdeen mánadag kl. 19.00.

SANSIR · TEL 355 355

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways
www.atlantic.fo




# Tey ungu ov lítlan áhuga

LØGTINGSVAL
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Javnaðarfelagið í Norðoyggjum hevur enn ikki fingið listan við valevnum til løgtingsvalið lidnan.

Sjey valevni kunnu vera á listanum, men enn eru bara fimm nøvn komin uppá.

Hesi fimm eru: Vilhelm Johannesen, Tummas Lervig, Jógvan Páll Poulsen, Torleif Sigurðsson og Mamy Dahl Sørensen.

Afturat hesum er ein, ið umhugsar seg, og væntar felagið at fáa svar frá hesum sum skjótast.

- Vit høvdu tann sama trupulleikan seinasta ár, sigur Vilhelm Johannesen.

- Vit vita ikki, hví tað skal vera so trupult at fáa fólk at stilla upp. Møguliga kemst tað av, at tey ungu í dag hava ov lítlan áhuga í politikki sum heild. Vit hava roynt at fingið okkurt ungt fólk inn á listan, men tað er so ikki eydnast okkum enn. Tað vísir seg eisini at vera trupult at fáa konufólk á listan, men vit royna okkara besta, greiðir Vilhelm frá.

Í komandi viku skal felagið hava ein enn ein fund um uppstillingina, og vóna teir at fáa listan lidnan til ta tíð.

# Føstulávintshald við Angelu í SMS

FØSTULÁVINT
*Tíðindaskriv*

Aftur í ár verður føstulávintshald fyri yngru børnunum í sølumiðstøðini í Havn.

Mánadagin verður Torgið í SMS karmur um føstulávintshaldið við tunnusláttri, føstulávintskøkum og andlitsmáling.

Í ár er tað Angela – sum flest øll børn í Føroyum kenna – sum skipar fyri føstulávintstiltakinum í SMS.

Tiltakið byrjar kl. 15, tá tunnusláttur verður fyri børnum undir skúlaaldur.

Tá kattakongarnir eru funnir og hava fingið sínar vinningar, bjóðar SMS føstulávintskøkur, kakao og Pop Top til øll. Tá verður eisini møguleiki hjá børnunum at fáa andlitið føstulávintsmálað av Angelu og hjálparfólki hennara.

Áðrenn tiltakið endar kl. 17.30 fáa øll børn ókeypis SMS ballónir heim við sær.




FAST·LÁN
lán við føstari rentu




petur & petur · 320870

FastLán - so fert tú ikki av fótum

At seta føtur undir egið borð merkir sum oftast, at tú bindur teg í mong ár.

Tí er umráðandi at fáa røttu ráðgevingina og rætta lánið, soleiðis at tú eisiniført ráð at búgva og liva í komandi árum.

Føroya Banki kann sum fyrsti peningastovnur í Føroyum bjóða tær FastLán, sum er eitt lán við fastari rentu.

Tá tú tekur lán við fastari rentu, veitst tú altíð, hvussu nógv tú skalt gjalda, og gjaldið verður ikki ávirkað, tá rentan hækkar.

Lækkar rentan hinvegin, kanst tú altíð innfría verandi lán og taka upp nýtt lán fyri eina lægri rentu.

Kom inn í Føroya Banka og hoyr nærri um, hvussu FastLán kann gera tín gerandisdag eitt sindur tryggari - ár eftir ár eftir ár...

FØROYA BANKI



FØROYATELE
Skapið framtíðina saman við okkum

NEYVAN!



Vit lækka prísirnar á GSM
samtalum frá 1 februar.

TÚ SPARIR NÚ
25 oyru
fyri hvønn minutt, tú tosar

Um dagin 1,90 kr/min
Um kvøldið 1,15 kr/min

Kvøld er: kl. 18.00 til 08.00. Príslækkingin er galdandi fyri allar samrøður frá vanligum GSM-haldi. Fyrivarni verður tikið móti prentvillum